# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stórar íløgur á landgrunninum

Í farnu viku bórust tey góðu tíðindi, at útlendskt oljufelag hevur gjørt avtalu við føroyskar myndugleikar um at bora enn ein brunn á føroyska landgrunninum.

Hetta eru kærkomin tíðindi fyri ikki bert føroysku oljumyndugleikarnar, Jarðfeingi men so sanniliga fyri alt samfelagið. Tí íløgur uppá milliardir í leitibrunnar á landgrunninum eru íløgur í framtíðina, hvat vit so enn halda um eina framtíðar føroyska oljuvinnu.

Við hesum seinasta brunninum hevur Jarðfeingi tryggjað sær, at tríggir leitibrunnar verða boraðir komandi árini. Frammanundan eru seks brunnar boraðir, so vit nærkast tí magiska talinum, sum oftani verður brúki í oljuleiting, nevniliga at tú í meðal skal bora 10 brunnar fyri at gera eitt fund. Hesi tríggir brunnarnir verða nr. 7, 8 og 9.

Føroyska samfelagið hevur nú í mong ár varðveitt og ment eina umsiting, sum hevur sum aðalmál at fáa útlendsk oljufeløg at gera íløgur á landgrunninum tvs. at bora brunnar við tí fyri eygað at finna kolvetni, olju ella gass í undirgrund okkara. Startskotið var fyri júst 10 árum síðani, at fyrstu loyvini vórðu latin á stórslignari samkomu í Norðurlandahúsinum. Seks eru boraðir og staðfest er ein virkin kolvetnisskipan, ið gevur okkum eina ábending um, at møguleikar eru at finna kolvetni í rakstrarverdugum nøgdum.

Nú 10 ár seinni bíða vit framvegis eftir loysunarorðinum, men hóast tað, so má sigast, at lív er í leitingini framvegis. Tað hevur sjálvandi verið hugstoytt at síggja fleiri av oljufeløgunum rýma, men ymsar orsøkir hava verið til tess. Vit eiga harafturímóti at fegnast um, at tað framvegis eru fleiri oljufeløg, sum trúgva uppá, at her er olja og gass í undirgrundini. Tey eru Statoil, Dong, OMV, ENI, Shell, Cieco, Geysir, Føroya Kolvetni og Atlants Kolvetni. Og tað eru so eisini flestu av hesum feløgunum, sum verða við til at bora tríggjar brunnar komandi árini.

Flaggskipið ella lokomotivið um tú vil í leitingini er norska Statoil, sum hevur gjørt avtalu um at bora tveir brunnar. Síðani er tað italska ENI, sum fer at bora ein brunn.

Longu í apríl í ár verður borurin settur í Anne Marie leitimiðið, sum oljuserfrøðingar hava stórar vónir til. Kanska vit longu í summar fara at frætta góð tíðindi frá hesum sjeynda brunninum. Men eftir hetta hava vit so enn tvey skot í byrsuni, tá Statoil fer at bora í 2011 og síðani enn ein brunn í 2012 ella 2013. Verður bara ein av hesum trimum brunnum eitt fund, so skal lítið til fyrr enn vit hava uppaftur fleiri leitibrunnar á tekniborðinum.

Tí er tað ikki ov nógv sagt, at hesi komandi trý árini verða rættiliga avgerandi fyri føroysku oljuframtíðina. Eitt fund longu nú í vár fer at seta gongd á eina spildurnýggja menning í føroyska samfelagnum, eina menning, sum vit mugu læra okkum at stýra og skipa, so vit ikki missa tamarhaldið á henni. Og har eisini umhvørvisálit eiga at verða raðfest høgt.

**Sosialurin**

## Fólkakirkjan vil framvegis gifta fráskild

**MAGNUS BRAHÉ JØRGENSEN**
sóknarprestur



Eg haldi, at hetta eigur at verða skoytt uppí kjakið um Fólkakirkjuna, nú fleiri »konservativir« prestar eru settir í starv, sum ikki vilja víga fráskild.

**Vígsla av fráskildum:**
Jesus verður av farisearunum drigin uppí kjakið um strangari ella linari reglur fyri hjúnarskilna. Hjá Markusi og Lukasi noktar hann fyri hjúnarskilna út frá Skapanini (Mk 10,1; Lk 16,18). Uppafturgifta verður hildið at vera brot á hjúnarlagið. Men hjá Matteusi er eitt undantak, nevnilig, tá talan er um ótrúskap (Mt 5,32; Mt 19,9). Samsvarandi hetta, sigur Matteus frá, at Jósef umhugsar at lata seg skilja frá Mariu (Mt 1,19). Paulus skrivar, at bert deyðin kann gera skilna millum tvey (1 Kor 7,10). Men Paulus loyvir tó skilna, tá talan er um eitt blandað hjúnarlag, har tann ikkitrúgvandi parturin tekur hetta stig (1 Kor 7,12-16).

Tí vil eg víga fráskild og doypa børn teirra.

**Kvinnuligir prestar:**
Í Nýtestamentligari tíð var samfelagið rættiliga patriarkalskt.

Kvinnur vóru vardar og æraðar sum konur og møður, men lutøka teirra í almenna og átrúnarliga lívinum var sera avmarkað. Myndin, evangeliini geva av Jesu boðskapi, er ikki nakað álvarsamt brot ímóti patriarkalska samfelagnum.

Teir tólv ápostlarnir vóru menn, men eisini kvinnur fylgdu honum (Mk 15,40-41). Jesus góðkendi kvinnur meira enn samtíðin (Mk 5,25).

Hjá Lukasi evangelisti hava kvinnur ein leiklut og fylgdu Jesusi, eitt nú Marta og Maria (Lk 10,38). Og ÁpS og Paulus siga frá bæði monnum og kvinnum, sum leiða samkomur og sum ferðandi ápostlar (ÁpS 16,13; 18,2; 18,26; Róm 16,1-16).

Eins og lærusveinatignin er kristniboðanartignin ofta eitt forrættindi fyri menn. Men í Jóhannesarevangeliinum verður Maria Magdalena góðkend sum evangeliserandi vitni av Jesusi sjálvum í Jh 20,17: Jesus sigur við hana: "Nem ikki við meg; tí at eg eri enn ikki farin upp til faðirin; men far til brøður mínar og sig teimum: Eg fari upp til faðirin; men far til brøður mínar og sig teimum: Eg fari upp til faðirs míns og faðirs tykkara." Í ø18. Maria Magdalena kemur og boðar lærusveinunum: "Eg havi sæð Harran!" og at hann hevði sagt henni hetta.

Paulus játtar, at kvinnur profetera (1 Kor 11,5), men biðjur tær eisini tiga í samkomuni (1 Kor 14,35). Gal 3,28 kan standa sum yvirskrivt fyri áskoðaina á kynsleiklutir í NT: "Her er ikki Jødi ella Grikki, her er ikki trælur ella frælsur maður, her er ikki kallur ella kona; tí at tit eru øll ein maður í Kristi Jesusi."

Tí vil eg samstarva við kvinnuligar prestar.

**Samkynd og teirra viðurskifti:**
Bílian góðtekur bert reproduktivan kærleika, sum endurnýggjar seg. Í GT verða samkynd hildin at forbróta seg ímóti skaparaverkinum. Í NT er hesin livihátur dømi um guðloysi heidninganna. Paulus nevnir hetta frá-fallið (Róm 1,26-27). Tey umvendu verða ávarað ímóti hesum afturstigi, tí tey kunnu missa arvarættin til Guðs ríki (1 Kor 6,9; 1 Tim 1,10).

Tey samkyndu eru tó skapað í Guds mynd, og Jesus sigur, at vit skulu elska, og tey samkyndu eru tí vælkomin í Fólkakirkjuni, ið hvussu so er hjá mær.

## Kvinnuting a la ungdómsting

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR**



Kveikjandi og hugaligt at hoyra næmingar úr framhaldsdeildunum kring landið leggja uppskot fram og gera viðmerkingar – nú ungdómsting er í Løgtinginum.

Okkum tørvar tey ungu á tingi. Nógvir føroyingar siga seg hava mist áhugan fyri politikki. Ein orsøk er, at tey ikki kenna seg aftur ella kenna seg umboða á tingi.

**Tingið ein endurspeglan av fólkinum**
Um tingið skal endurspegla samfelagið er tørvur á ungum politikarum – menn og kvinnur undir 30 ár. Ivist ikki í, at málini sum vórðu løgd fram, fyrispurningar og kjakið, tá var fjølbroyttari. Vóni, at nøkur teirra sum júst nú luttaka á ungdómstingi verða valevni, tá tey fáa valbæri um fá ár.

**Demokratiu kvinnuting**
Vit vita øll, at játtanin til Demokratiu bleiv skerd við fleiri 100.000 kr í fíggjarlógini í ár. Kanska vit politikarar kundu bøtt eitt sindur um hesa dáragerð, við at bjóða Demokratiu at skipa fyri einum kvinnutingi a la ungdómstingi? Á hendan hátt fingu kvinnur úr øllum flokkum, í øllum aldri og úr øllum landinum høvi at vera tingkvinnur og varpa ljós á júst tey mál, sum tær halda vera týdningarmikil. Eg eri við upp á tað.

**Megakuuul**
Tosaði við nøkur teirra í dag. Spurdi, hvat teimum dámdi at vera politikarar. "Megakuul!" svaraði ein ung skilagóð genta.

Um hetta er ein háttur at geva teim ungu áræði og áhuga fyri politikki er nógv vunnið. Bæði gentur og dreingir vóru skilagóð at hoyra. Má leggja afturat, at tað frøddi meg almikið at síggja genturnar vóru so vælumboðaðar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.